# Øll starvsnevndin útskift

**FÓTBÓLTUR** Jógvan Páll Joensen, Heðin D. Poulsen og Trygvi Mortensen komu inn við stórum meiriluta, meðan Karl Vidtfeldt og Niclas Davidsen bert fingu fáar atkvøður

Hilmar Jan Hansen

– Vit vistu, at vit komu at raka og sára fólk í felagsskapinum, men kundu vit finna eina loysn, kundi nakað gott koma burturúr. Vit føldu, at FSF var í einari keðiligari støðu og ikki kom víðari, og tá feløgini eiga felagsskapin og formenninir mynda feløgini, valdu vit at tosa um loysa knútarnar.

Soleiðis tók formaðurin í KÍ, Tummas Lervig, saman um útskiftingina av starvsnevndarlimum, sum nú er gjøgnumførd yvir tveir aðalfundir í Fótbóltssambandinum. Samstundis undirstrikaði hann, at alt hetta nú var søga og talvan vaskað rein, so nú ráddi um at koma víðari.

Á aðalfundinum í fjør fóru Rúni Heinesen, Magnus á Stongum og Sveinur Tróndarsson úr nevndini, og undan hesum fundinum fór Niklas á Líðarenda eisini út. Í fjør tók Høgni í Stórustovu forsetavalið og tapti, og somu lagnu fingu Karl Vidtfeldt og Niclas Davidsen, ið eisini valdu at lata seg stilla uppaftur, hóast stórur meiriluti av feløgunum vildi hava teir út – eins og hinar, ið undan vóru farnir.

Tølini talaðu eisini, tá starvsnevndarvalið var á aðalfundinum leygardagin, tí Jógvan Páll Joensen fekk 37 atkvøður, Heðin D. Poulsen 31 og Trygvi Mortensen 29, so teir blivu allir valdir sum nýggir limir við stórum meiriluta aftan fyri seg.

Hinvegin fingu Karl Vidtfeldt og Niclas Davidsen bara ávikavist átta og seks atkvøður.




*Teir tríggir nýggju nevndarlimirnir í Fótbóltssambandinum, ið leygardagin høvdu stóran meiriluta aftan fyri seg. Frá vinstru Trygvi Mortensen, Heðin D. Poulsen og Jógvan Páll Joensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Eydnaðist partvíst

Hóast Karl og Niclas aftaná blivu valdir sum varalimir við 22 atkvøðum í part, var tað ikki meira sannførandi enn so, at fleiri av feløgunum heldur sóu, at teir fullkomuliga tóku seg úr nevndararbeiðinum. Mortan Poulsen og Kristian Dahl vóru eisini í uppskoti, tí fleiri feløg vildu ikki lata hinar báðar koma inn sum sjálvskrivaðar varalimir, men Mortan og Kristian fingu ávikavist 17 og 13 atkvøður, so heilt á mál kom útskiftingin ikki.

Tað var annars ein breið semja millum formenninar í feløgunum á heysti í 2009, ið legði botn undir útskiftingina, og leygardagin var ein lítil undanfundur, har roynt var at fáa øll at halda fast við semjuna. Hetta eydnaðist bara partvíst, men óansæð, so tykjast allir partar nú vilja leggja hetta aftur um seg og koma víðari.

– Eg vil ynskja teimum nýggju tillukku og síggi fram til gott samstarv, samstundis sum tað altíð er tungt at siga farvæl við fólk, sum hava verið leingi við, segði FSF-forsetin, Christian Andreasen, tá hann at enda takkaði fyri ein góðan og siðiligan aðalfund.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Øll feløgini møttu

**FÓTBÓLTUR** Aðalfundurin hjá Fótbóltssambandinum gjørdist drúgvari enn vanligt, men annars var tann 32. í røðini lítið øðrvísi enn teir undafarnu



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hilmar Jan Hansen

Øll 22 limafeløgini í Fótbóltssambandinum vóru møtt upp til aðalfundin í FSF-húsinum leygardagin. Fyrr plagdi aðalfundurin at byrja klokkan 10 og endaði við døgurða um miðdagsleitið, men hesa ferð var døgurðin fyrst á skránni klokkan 12 og so byrjaði aðalfundurin klokkan 13. Av tí sama gjørdist talan um ein heldur drúgvari aðalfund enn vanligt, tí hann varði í næstan hálvanfjórða tíma.

Áðrenn fundurin byrjaði, segði FSF-forsetin, Christian Andreasen, nøkur orð um Andrias Poulsen úr Gøtu, sum doyði herfyri. Andrias var kanska mest kendur frá døming og var eitt nú altjóða linjudómari, og eisini var hann seinasti formaðurin í GÍ. Tøgn var í eina løtu honum til minnis, og so var annars klárt at fara undir sjálvan aðalfundin.

Eftir ársfrágreiðing forsetans og framløguna av grannskoðaða roknskapinum, bar litaviska UEFA-umboðið á fundinum, Liutauras Varanavicius, fram eina heilsan og rundaði av við at ynskja Føroyum góða eydnu í komandi undankappingunum hjá U21- og A-landsliðunum. Liutauras Varanavicius er eitt kent andlit í Føroyum og hevur vitjað fleiri ferðir.

Aðalfundurin samtykti millum annað, at nú hava øll feløg eina atkvøðu á aðalfundinum, men um tey hava bæði vanksnamanna- og ungdómslið, fáa tey tvær atkvøður. Hetta uppskot hevði beinanvegin við sær, at FC Hoyvík Undri FF og FF Giza fyri fyrstu ferð á aðalfundi í Fótbóltssambandinum fingu atkvøðuseðil útflýggjaðan, tí tey nú høvdu eina atkvøðu í part.

Eisini varð einmælt samtykt, at EB/Streymur skuldi takast upp sum nýggjur limur í Fótbóltssambandinum, nú EB/Streymur er limafelag og ikki bert ein felagsdeild hjá EB og Streymi.

*hilmarjan@sosialurin.fo*